


**Nr. 23** *9. novembur 2025* **85. árg.**

# Tætt inn til Jesu hjarta

1. nov. allahalgannakvøld og minningardag teirra sjólátnu vísti KVF ein dokumentarfilm um, tá ið Fossanes fórst. Hvalvíkingurin, Agga í Jógvansstovu, var bestimaður umborð og fórst við Fossanesi. Agga var trúgvandi maður.

Sunnukvøldsmøti vóru hildin í gamla skúla, áðrenn missiónshúsið varð bygt. Kjokkfult av fólki var á møti. Hurðin út í gongina stóð opin, og har stóðu fleiri fólk, eisini Trina, sum hevur sagt mær hetta:

Agga fer so upp á talarastólin og lesur úr Sálmi 42: „Ligesom en Hjort skriger efter Vandstrømme, saa skriger min Sjæl til dig, o Gud! Min Sjæl tørster efter Gud, efter den levende Gud; naar skal jeg dog komme og ses for Guds Ansigt?..." Síðani legði hann orðið út, og tað gjørdi hann so livandi, at Trina sá alt hetta so klárliga fyri sær: Har inni í skógini á einum grønum bletti gongur hjørturin og er um at avmaktast av tosta. Hann lyftir høvdinum upp móti himli og sker í hart róp av tosta.

Hetta vitnaði hann, áðrenn hann fór sín seinasta túr. Hetta er vert at hugsa um. Trúgvin er ikki okkurt, vit hugsa við okkara heila, at Gud er nokk til, og at hann er uppi í himlinum. Tað kallast religión. **Trúgv er eitt samband**, eitt hjartasamband við okkara Frelsara. Eg tosi við Harran, annaðhvørt inni í mær sjálvari, ella teskandi ella hart. Tá ið eg vakni, sigi eg: „Góðan morgun, Harri. Á dett vakra veður. Takk fyri góðan svøvn í nátt." Tá ið eg geri døgurða, sigi eg: „Harri, signa henda matin, og lat hann gagnast mær væl." Og so gangi eg og og smápráti við Harran gjøgnum dagin. Tá ið eg fari til handils, sigi eg: „Harri, nú fara vit bæði, tú og eg. Ansa væl eftir mær. Lat meg

koma fram og heim aftur í øllum góðum. Lat hetta keypið eydnast væl.“ Tá er trúgvin komin niður í hjartað, tað er eitt hjartasamband.

*Effie Campbell.*

# Hindugentan Maya

Ein trúboðari boðaði orðið í Himalaya. Men nú er tað soleiðis, at tað er ikki altíð nóg mikið bara eina ferð at vitja eina bygd, og hey, so hava øll tikið ímóti Jesusi. Tað kann taka tíð, áðrenn fólk koma til trúgv.

Trúboðarin kom til bygdina hjá Mayu, og hann fekk høvi at siga henni frá okkara Frelsara, Jesus Kristus. Maya var hinduari og fylgdi gjølla øllum ritualunum. Hon var rótfest í sínari trúgv upp á hindugudarnar.

Trúboðarin greiðir frá: „Eg hitti Mayu í hennara bygd og fekk høvi at siga henni um okkara Frelsara, Jesus Kristus. Sjálvt um hon hevði hoyrt um Jesus fyrr, so visti hon kortini ikki, hvør ið Hann var, ella hvat ið Hann hevði gjørt fyri okkum“.

So greiddi eg henni frá, at „Gud elskaði heimin so nógv, at Hann sendi einasta son sín, Jesus Kristus, til hesa verð sum eitt menniskja fyri at frelsa menniskju frá syndum teirra og geva teimum ævigt lív, teimum, sum trúgva á Hann.“

Hon spurdi ymiskt um hindutrúnna og aðrar religiónir, og eg segði henni, at religión er menniskjans roynd at røkka Gudi, men í kristindóminum er tað Gud, sum í skapilsi av einum menniskja kom her niður til okkara, so vit kundu gerast Guds børn. Eg segði henni eisini, at góðar gerðir og religión ikki kunnu frelsa okkum.

Næstu ferð, vit komu til hennara bygd, hittu vit hana aftur. Eg helt á at siga henni frá tí, vit høvdu tosað um síðstu ferð, og eg segði henni, at uttan Jesus er tað eingin, sum kann koma inn í himmalin, av tí at Hann er lykilin og Vegurin til himmalin.

Eftir at hon skilti tað, sum eg segði henni frá um evangeliið um Jesus, gjørdi hon av at geva Harranum lív sítt, og hon vildi vera saman við Jesusi í ævinleikanum í himli. – So leiddi eg hana í frelsubønina. – Tað er undurfult! – Hugsa tær, hvat ið menniskju lata gleppa sær av hondum, av tí at tey ikki vita, hvat ið Jesus longu hevur gjørt. Støðan her rundan um okkum er kanska hin sama: grannin, starvsfelagin, floksfelagin, vinmaðurin hava kanska hoyrt um Jesus … hava hoyrt navn hansara

og vita, at hetta hevur okkurt við kristindómin og okkurt við ein kross at gera, men tey vita ikki rættiliga, hvør ið Hann er, og hvat ið Hann hevur gjørt fyri tey.

Hvat ætla vit at gera við tað?

*Effie Campbell* umsetti.

# Ræðslunáttin á Titranhavinum í 1899

*„Gud er okkum vernd og verja, ein hjálp í trongdum, ið aldri svíkur." Sálm. 46,2.*

Mong hava hoyrt um henda sorgarleikin ella hava lisið um hann í bókini „Havet tok dem". Norsk Gyldendal hevur givið hana út í 1987. Trýss útróðrarbátar gingu burtur, og 140 útróðrarmenn sjólótust, og uppaftur fleiri sótu eftir í sorg, beiskleika og sakni í mong ár fram í tíðina.

Men mitt í øllum hesum syrgiliga er ein frásøgn um, hvussu hin trúgvandi útróðrarmaðurin Jens Wold varð bjargaður, tí Gud greip inn sum svar upp á bøn. Í áðurnevndu bók verður hetta kallað „eitt undur", men einki meir verður nevnt um hetta.

Men her er tað, sum av sonnum hendi, sambært tí, sum abbasonurin, Arvid Wold, hevur fest á blað:

Seinnapartin hin 13. oktober 1899 fóru 90 útróðrarbátar út úr Titran havn vestan fyri Tróndheim. Luftin var myrk og regnmikil, og sjógvurin var serstaka stillur. Umborð á øllum fiskiførunum gekk prátið. Nógvir royndir útróðrarmenn ivaðust og ætlaðu sær satt at siga ikki at fara. Tí tað var, sum okkurt var í luftini. Men hin vegin freistaði stórsildin. Fongurin hevði verið góður síðstu nátt.

Førini komu út á fiskileið og settu gørnini. Hetta næstan óhugnaliga kvirra veðrið vardi, til farið var av midnátt. Tá brast óveðrið á og við slíkari megi, menn ikki høvdu upplivað fyrr. Kolandi stormur. Ein sorgarleikur, har lív og deyði bardust. Trýss fiskifør gingu burtur, og 140 útróðrarmenn sjólótust.

Jens Wold var saman við fimm øðrum monnum farin at seta gørn við fiskifarinum „Ervingen". Hesin lítli báturin rak móti Sildholmen og knústist móti klettinum.

Ótrúligt, men tað eydnaðist at seta hin lætta bjargingarbátin út. Men í somu løtu reistist ein øgiligur sjógvur, sum lyfti „Ervingen" inn móti landi, meðan lítlibátur við bara Jensi

umborð varð sogin út í opnan sjógv, og tá byrjaði hin mest einsliga og vónleysa váðasigling í lívinum hjá Jensi Wold – í einum soraðum bjargingarbáti, í kolandi stormi og svørtum himli. Hann ikki bara bað – á nei, hann rópti neyðarróp til Guds í himli.

Um somu tíð var kona hansara í stórari neyð hansara vegna. Gjøgnum náttarinnar tímar stríddist hon á knøum í bøn. Um kl. 3 fór hon á føtur við vissuni um, at Jens **var** bjargaður!

Um tað mundið hevði hesin einsligi havreki sæð deyðan í eyguni í tímar. Tað, at hann og lítlibátur flutu, var bart út sagt eitt undur. Men at hann sjálvur hevði fingið **vissuna** um bjarging, ja, tað var uppaftur meira ófatiligt.

Mitt í hesum ógvisligu aldunum ber Jens eyga við eitt skip, sum siglir framvið stutt haðani. Hann rópar so hart, hann orkar. Men skipið hvarv í myrkri og sjóroki. Stutt eftir kom tað aftur og setti kós beint ímóti honum. Tað umbarst ikki, at ein samanbrestur kom at verða! Men har kom eingin samanbrestur. Staðin fyri reistist ein ómetalig alda, sum lyfti Jens upp úr hinum smildraða lítlabáti og bar hann inn á dekkið á hinum skipinum!

Soleiðis bjargaðist Jens Wold!!! Umborð á „Fridtjof Nansen" sá eingin nakað, fyrr enn teir raktu við Jens á dekkinum. Tá hildu teir seg síggja yvir seg!

Tveir dagar seinni komu nakrir, sum bjargaðust frá „Ervingen", við teimum tungu boðum til konu Jens, at maður hennara var sjólátin. Men hon trúði teimum **ikki**! Vissan úr himli búði enn í hjarta hennara!

Tríggjar tímar seinni stóð Jens Wold har, sprelllivandi! Á dett undur at skula síggjast og hittast aftur! Og hetta skapaði stóra ærufrykt og virðing fyri tí livandi Gudi.

*„Tro & Fakta" – Effie Campbell umsetti.*
*Far inn á YouTube og skriva „Titranulykka 1899".*

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 9. nov. | **Tekstur:** | Matt. 28,18–20: Áps. 10,1–8 + 34–35 + 39–43 | **Bíbliuorð:** | Matt. 28,19a |
| 16. nov. | **Tekstur:** | 2. Mós. 2,1–10 | **Bíbliuorð:** | Jer. 29,11 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 24** ***23. novembur 2025*** **85. árg.**

# Hvar er himmalin?

*„Men savnið tykkum gripir í himli ... Tí at har sum gripur tín er – har man eisini hjarta títt vera.“ Matt. 6,20–21.*

Eydnan er ikki bundin at tí, sum hendir; men eydnan er bundin at okkara støðu til tað, sum hendir. Hatta lærdi pápi meg, og eg havi ofta hugsað um tað, sum pápi lærdi meg um eydnu og um tað, sum verður okkum fyri. Men tað gjørdist ongantíð so greitt fyri mær sum ta ferðina, eg var í Korea mong, mong ár seinni.

Eg hevði verið í Fjareystri í tríggjar mánaðir, mest í Korea. Meðan eg var har, talaði eg á nógvum møtum í skúlum, barnaheimum og kirkjum.

Ein dagin, eftir at eg hevði talað í einum fróðskaparsetri, kom ein teologiskur studentur yvir til mín. Ongantíð áður hevði eg sæð eitt so dapurt andlit á einum, sum segði, at hann ætlaði sær at gerast prestur fyri hinum upprisna Kristusi.

„Hví ert tú so ólukkuligur?“ spurdi eg.

„Eg eri vilstur,“ segði hann sorgarbundin. „Tá ið eg gjørdist kristin, lærdi prestur meg, at Bíblian er sonn. Tá var eg eydnusamur. Men nú læri eg um hin viðgitna Rudolph Bultmann, og hann skrivar, at Bíblian er full av fáplum og samanpentaðum søgum. Eg eri vilstur og veit ikki longur, hvar ið himmalin er.“

Eg gjørdist fúkandi óð. Tað kundi ikki vera rætt, at hesir einfaldu dreingirnir í Korea skuldu stríða seg gjøgnum hesa ræðuligu teologiina. Teir granskaðu tíma eftir tíma á fróðskaparsetrinum, gingu tvær ferðir so leingi í skúla sum studentarnir í Amerika, og av tí at teir lósu, skuldu teir missa trúnna.

Eg hugdi upp á tann unga teologistudentin, sum stóð framman fyri mær.

„Jesus segði: „Guds ríki er innan í tykkum“ (Luk. 17,21): Bultmann fer skeivur. Jesus hevur rætt. Himmalin er ikki ein lygisøga ella eitt ævintýr: Himmalin er eitt stað, sum er fyrireikað fyri menniskju, sum eru fyrireikað. Teologi í hondunum á Heilaga Andanum er ein yndisligur vitskapur. Men í hondunum á vantrúgvandi er hon deyðans vitskapur. (Gud kemur ikki til orðanna. Fyri hvørja síðu í Bíbliuni, lesa teir 1000 síður til útlegging.) Um tú vilt finna útav, hvar himmalin er, far so út úr tí støvutu floksstovuni og far út á bygd. Lurta eftir tí einfaldu trúnni hjá teimum, sum bara lesa Bíbliuna og bara trúgva á Gud og ikki á materiellar lutir. Líka leggja tey í, um ein ella annar teologur sigur, at himmalin er ein uppfunnin søga. Tey hava funnið Jesus, og har sum Jesus er, hava tey himmalin.“

*Corrie ten Boom. – Effie Campbell* umsetti.

# Tað, vit longu hava í Jesusi Kristi

*Thomas Åleskjær*

Í 2. Kongabók 6,15–17 lesa vit um profetin Elisa. Hann verður eisini í hesum tekstinum kallaður Gudsmaðurin. Tá ið tænarin morgunin eftir sær ein stóran her, sum hevði kringsett býin, spurdi hann Elisa, hvat ið teir skuldu gera.

Í v. 17 biður Elisa Harran lata eyguni á tænaranum upp, so hann kundi síggja. Tá ið Harrin læt eyguni á dronginum upp, sá hann, at fjallið var fult av eldhestum og eldvognum.

Elisa var ein vandur og royndur profetur. Hann sá óttan og ráðaloysi í eygunum á dronginum. Elisa biður ikki Gud taka óttan burtur. Alt, sum Elisa biður um, er, at Gud skal lata eyguni í dronginum upp, so hann kann síggja. Tað sama biður Paulus fyri meinigheitini í Efesus, í Ef. 1,17–19, har hann biður Gud geva teimum vísdóms og opinberingar anda, so at tey læra at kenna Gud.

Tað áhugaverda er, at hjálpin úr himli ikki kemur, eftir at hann bað. Einki nýtt hendi í umstøðunum sum ein avleiðing av, at teir róptu til Guds. Guds trúfesti var hvørki størri ella minni, tá ið eyguni á dronginum lótust upp.

Tað einasta, sum hendi, var, at drongurin sá eldvognarnar og hestarnar, sum alla tíðina høvdu verið har. Brádliga sá hann tað, og tað stimbraði hansara mót. Fyri onkran, sum í

dag rópar til Guds og biður hann broyta støðuna, vil Gud lata eyguni upp, so tey síggja, hvat ið tey longu hava.

Gud hevur ikki vitjanartíð. Hann hevur opið alt samdøgrið.

*Effie Campbell* umsetti.

# Dupult adressa

*Johnn Hardang*

Hvar býr Gud? Ja, hann hevur dupulta adressu. Hann býr í Himli, og hann býr í hjartanum hjá teimum, sum bjóða honum inn. Hetta boðar Zakarja eisini: „Eg komi og taki upp bústað í miðjari tær, sigur Harrin.“ (Zak. 2,14).

Jesaja 57,15 sigur okkum eisini hesa dupulta adressuna: „Eg búgvi á høgum, heilagum staði, hjá hinum sundurbrotna, hvørs hugur er niðurnívdur, til tess at lívga hug hinna niðurnívdu og hjarta hinna sundurbrotnu.“ Hjá tí, sum tað ikki lukkaðist so væl fyri her í lívinum, og sum er sundurknústur um tað, hjá tí vil Harrin búgva, um tey loyva honum. Tí „Hann varð særdur vára synda vegna og sundurbrotin vára misgerða vegna; okkum til friðar kom revsingin niður á hann, og av sárum hans fingu vit heilsubót.“ (Jes. 53,5).

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein „flótandi livur“

Her greiðir Ludvig Karlsen, sum rak eitt arbeiði millum alkoholikarar og narkomanar í Noregi, og sum í 1983 saman við konuni setti „Evangeliesentret“ á stovn, frá lívi sínum. Ludvig fór heim til Harran í 2004:

Vit fingu ein mann inn á Sentrið. Hann kallaðist Arni. Hann hevði verið á Ríkissjúkrahúsinum í Oslo, og har hevði hann fingið at vita, at hann hevði bara nakrar dagar eftir at liva í, tí livurin var „flótandi“, sum teir kallaðu tað, tí hann hevði verið misnýtari í mong ár.

So fór hann til Rúsdrekkasøluna og stillaði seg í bíðirøðina, tí nú kundi alt gera tað sama. Nú ætlaði hann sær at brúka sínar seinastu krónur at keypa sprutt fyri, so hann fekk drukkið seg í hel. Tá tosaði Gud við eina eldri kvinnu, sum kom gangandi framvið: „Far og sig við handa mannin, at eg kann geva honum eitt nýtt lív.“

Konan fór yvir til Arna og skumpaði undir hann og segði: „Tú skalt ikki standa her og keypa alkohol. Far niðan á

Evangeliesentrið, har hjálpa tey slíkum sum tær." Hon tosaði við slíkum myndugleika, at hann tordi ikki at mótmæla. So bað hon um ein bil og bað hýruvognsstjóran síggja til, at maðurin kom inn á Sentrið.

Har segði hann sína søgu, tók pappírið frá Ríkissjúkrahúsinum upp og vísti mær tað. „Ja, men hann, sum avger okkara dagatal, býr ikki á Ríkissjúkrahúsinum. Hann býr hægri uppi," segði eg og peikaði upp móti loftinum. Hann kendi als einki til kristindóm og helt, at eg meinti, at hann búði uppi á loftinum hjá okkum. Hann skilti ikki, at eg meinti Gud í Himlinum. Eg fór so upp á loft at biðja, og tá ið eg kom niður aftur, hevði eg eitt orð frá Gudi við til hansara: „Harrin sigur, at tú skalt als ikki doyggja, tú skalt verða settur í frælsi og fáa loyvi at liva."

Hann kom so við á eitt lítið vekingarmøti. Biðið varð fyri honum, og hann varð salvaður við olju, og hann varð grøddur í tí løtuni. Fjúrtan dagar seinni fór hann á Ríkissjúkrahúsið at taka røntgenmyndir. Tey skiltu einki. Navn og persónstal vóru bein; men røntgenmyndirnar vístu nú, at livurin á manninum var frísk. „Ja, tí Jesus hevur grøtt meg," vitnaði Arni.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Við jóltíðir, tá ið vit halda Jesu føðingardag, verður sungið, etið og drukkið meir enn vanligt. **– Er henda veitslan eisini ein gleði fyri Jesus?**

*e.c.* ums.

---

Sama sinnalag var í Stefani sum í Jesusi. Stefan livdi Gudi nær og fekk kraft at biðja fyri drápsmonnum sínum eins og Jesus gjørdi. „Harri, rokna teimum ikki hesa synd uppí!" bað Stefan.

*e.c.* ums.

---

Lógin er røntgan. Evangeliið er heilivágurin.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 23. nov. | **Tekstur:** | 2. Mós. 3, 1–14 | **Bíbliuorð:** | 2. Mós. 3,12 |
| 30. nov. | **Tekstur:** | 2. Mós. 4, 1–17 + 12,28–40 | **Bíbliuorð:** | 2. Mós. 12,13 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74